Í hesum faldara kanst tú lesa um bróstskurðviðgerð á Landssjúkrahúsinum.

Tú kanst millum annað lesa um hvussu tú fyrireikar teg til skurðviðgerðina og hvat tú kanst rokna við eftir at skurðviðgerðin er framd.



# Bróstskurðviðgerð

## á Landssjúkrahúsinum

Landssjúkrahúsið

Faldari um

bróstskurðviðgerð

á Landssjúkrahúsinum





**Ansa eftir bruna**

Tú skalt halda eyga við, at bruni ikki kemur í skurðin.

Er tú í iva um okkurt, ella kennist sárið heitt, er tað reytt og tú fært fepur, set teg í samband við Skurðambulatoriið B3 á 304500 lokal 5400 ella 5406.

Ambulatoriið er opið gerandisdagar millum kl. 8-16. Uttanfyri vanliga tíð verður tú biðin um at seta teg í samband við vaktlæknan á telefon 1870.

Um trupulleikar eru innan 24 tímar eftir skurðviðgerð, set teg í samband við G4 á 304500 lokal 5004.

**Samband**

Hevur tú spurningar ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Vinarliga

Starvsfólkini á Skurðambulatoriinum

**Tá tú kemur heim**

Vanliga er ikki nógv pína. Hevur tú tørv á pínustillandi, fæst tað í handkeyp. Vit mæla til, at tú keypir t.d. panodil, pinex ella pamol áðrenn skurðviðgerðina.

Plástur er sett á sárið og innanfyri eru steristrips, sum eru smærri plástur. Aftaná 24 tímar skalt tú taka tað uttara plástrið av.

Steristripsini skulu verða sitandi, til tú kemur aftur til kontroll á Skurðambulatoriinum B3. Tú fært eina tíð til kontroll, áðrenn tú fer heim.

Tú kanst fara í bað aftaná eitt samdøgur.



Eftir skurðviðgerðina kann tað koma fyri, at tað vætir úr sárinum. Er vætan til ampa fyri teg, t.d. um tað spennir nógv ella tú ikki fær armin inn at kroppinum, kann verða neyðugt at koma á sjúkrahúsið at tøma vætuna.

Tú tosar við sjúkrarøktarfrøðingin um møguliga tøming, tá tú kemur til kontroll.

## Soleiðis fyrireikar tú teg til skurðviðgerðina

### Dagin fyri skurðviðgerð

Dagin fyri skurðviðgerðina ringir ein sjúkrarøktarfrøðingur heim til tín millum kl. 14 og 15 at geva boð um, nær tú skal møta.

Um tú tekur heilivág regluliga, verður tú kunnað um, hvønn heilivág tú skal taka skurðviðgerðardagin og hvønn heilivág tú ikki skal taka.

### Vaska tær væl



Tú verður biðin at fara undir brúsu kvøldið fyri og taka hárini undir arminum burtur.

### Ikki eta eftir midnátt

Tú kanst eta til á midnátt og síðan skalt tú fasta. Loyvt er at drekka til tveir tímar áðrenn skurðviðgerð (sí faldara um doyving).

**Skurðviðgerðardagin**

Tú møtir fastandi. Tú verður biðin um at fara til leiðbeining at siga frá, at tú er møtt.

Ein sjúkrarøktarfrøðingur frá Dagskurð tekur ímóti tær og tú verður fyrireikað til skurðviðgerðina.

Tú fært samleikaarmband, operatiónsklæðir, stuðulssokkar, BH og vit máta blóðtrýst og puls.

Skurðlæknin kemur at tosa við teg og markerar skurðstaðið.

**Tak pínustillandi**

Tú fært bjóðað pínustillandi tablettir áðrenn skurðviðgerðina. Hesar kanst tú svølgja við vatni.

Tablettirnar eru langtíðarvirkandi móti pínu, og virka undir og aftaná skurðviðgerðina.

Síðani verður tú heintað av portøri, ið koyrir teg til skurðstovuna.

Tá skurðviðgerðin er liðug, verður tú flutt til viðrakningar. Tá tú ert vaknað kemur tú aftur í Dagskurð.



## Eftir skurðviðgerð

Tú kanst eta og drekka beinanvegin.

Tað er umráðandi, at tú kemur á føtur so skjótt sum til ber eftir skurðviðgerðina. Hettar minkar um vandan fyri hjáárin. Vit stuðla tær sjálvandi í tann mun, tað er neyðugt.

**Møguliga bløðir í skurðinum**

Aftaná skurðviðgerðina kann tað koma fyri, at tað bløðir í skurðinum ella innan fyri skurðin. Hendir hetta, kann tað verða neyðugt at steðga bløðingini,við einari minni skurðviðgerð.

Tað er ikki óvanligt, at landið litast blátt. Hetta kemur av kontrastini, sum er latið í bróstið undir skurðviðgerðini, og liturin verður sum oftast vanligur aftur aftaná eitt samdøgur.

**Ver saman við einum vaksnum**

Vit mæla til, at tú er saman við einum vaksnum fyrsta døgnið eftir skurðviðgerðina.